Landssjúkrahúsið

## Spurningar og svar til útboð um sjúkraflutningstænastu í Sandoy

*1. Hvør útbúgving verður kravd til leiðarin i SFT Sandoy?*

Leiðsla er ein fyrisitingarlig grein og setir LS ikki beinleiðis krøv í hesum sambandi í útbjóðingartilfarinum. Komandi veitarin fyriskipar leiðsluna. Um ein møguligur leiðari tekur vaktir á jøvnum føti við starvsfólkini, eru somu krøv galdandi sum til starvsfólkini.

*2. Vísandi til: Kunngerð nr. 9 frá 19. februar 2010 um skipan av sjúkraflutningstænastuni … verður hetta broytt ella kann fólkið sum eru i amb sandoy fáa skriftligaundantagsstøðu góðkenda inntil útbúgving er lokin?*

Liðlæknin tekur støðu til, hvør verður góðkendur í hvørjum einstøkum føri. Herundir hvør er viðgeri og hvør er assistentur. Sí eisini petti 3 í útbjóðingartilfarinum um útbúgving í samband við avtalubyrjan.

*3. Er áhugi fyri, at fáa starvsfólkini á Sandoynni í fakfelag s.s. starvsmannafelagið?*

Hetta er ikki upp til LS.

*4. Er møðuleiki fyri at starvsfólk úr Tórshavn kunna taka eina vakt um mánaðin á sandoynni (8timar) soleiðis, at man kann gera eina venjing/ undirvísing á Sandoynni?*

Nei – samsvarandi útbjóðingartilfarinum, so kann liðlæknin gera venjingar v.m. í Sandoynni. Sí eisini petti 5 í útbjóðingartilfarinum.

*5. Og í so fall at hetta ber til, at SFT Tórshavn kann gjalda fyri løninna hjástarvsfólkunum, sum koma sudur at "undirvísa"?*

I/A Sí svar omanfyri.

6. *Um starvsfólk úr Tórshavn koma suður og taka vaktir, eru tey tó lønt sum sftTórshavn lønir sínum starvsfólkum, ella soleiðis sum sft sandoy lønir sínumstarvsfólkum?*

Øll fólk , sum taka vaktir á Sandoynni hoyra til veitaran á Sandoynni.

**SjúkraFlutningsTænastan/Bráðdepilin**
J.C. Svabosgøta 41-49 • 100 Tórshavn • Tel. (298) 304500 • fax 314253 • www.ls.fo • ls@ls.fo

*7. Er møðuleiki at vaska og viðlikahalda ambulamsan á Sandoynni?*

Hetta kann takast upp við nýggja veitaran.

8. *Hvussu nógvar tímar um mánaðin loyva tit, at starvsfólki á sandoynni arbeidir?*

LS mælir altíð staðiliga til, at lóggáva um hvílitíð v.m. verða fylgd. Annars er tað veitarin í Sandoy, ið hevur alla starvsfólkaumsiting, sí petti 3 í útbjóðingartilfarinum..

*9. Um starvsfólk á Sandoynni blíva sjúk, hvør betalir sjúkratíðina?*

Tað er veitarin í Sandoy, ið hevur alla starvsfólkaumsiting, sí petti 3 í útbjóðingartilfarinum.

**Samanumtøka**
Alment vilja vit undirstrika, at øll starvsfólkaumsiting liggur hjá veitaranum í Sandoy. Tað vil siga øll lønarviðurskifti eisini í sambandi við sjúku v.m., og øll arbeiðsplanlegging herundir vaktir, hvílitíðir v.m.

Í sambandi við fakligu førleikarnar er tað liðlæknin, ið hevur hesa ábyrgdina, tá ræður um útbúgving og góðkenning av starvsfólkum.